# Áttamannafar framvegis saknað

**Seinnapartin mikudagin hvarv eitt áttamannafar á Nólsoyarfirði. Politiið hevur sett stórt leitingararbeiði í verk, men hósmorgunin høvdu teir framvegis onki funnið. Við bátinum var ein 65 ára gamal maður**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Ein 65 ára gamal maður fór um 14.15 tíðina mikudagin av Nólsoy. Hann setti kós móti Havnini. Upplýst verður av politistøðini í Havn, at fólk stóðu í Nólsoy og eygleiddu hann, til hann var komin út á hálvan fjørðin.

Veðrið var eitt sindur illfýsið, men sagt verður, at maðurin var ikki ókendur á sjónum.

Tá maðurin mikukvøldið framvegis ikki var komin fram, varð leitingararbeiði sett í verk. Skip og bátar á sjónum og tyrlan leitaðu eftir Hellu, sum er ein frambygdur glastrevjabátur. Hella er reyð og hevur gult stýrhús.

Brimil og Triton hava í nátt og fyrrapartin leitað á Nólsoyarfirði, eystanfyri Nólsoynna og Sandoynna. Skip og bátar vóru eisini við í leitingini fyrrapartin hósdagin.

Tvær tyrlur hjá Atlantsflog hava eisini verið og leitað. Onnur hevur leitað í økinum eystanfyri Streymoynna, framvið fjøruni, í Heystfirði, runt Hestoynna og Koltur. Hin tyrlan hevur leitað í Nólsoyarfirði og Tangafirði.

Umframt hetta hevur tyrlan hjá donsku sjóverjuni leitað framvið norðara parti av Sandoynni og í Skopunarfirði.

Umleið klokkan 11 fyrrapartin í gjár skuldi Golfstream flogfarið hjá donsku marinuni kanna eitt vítt havøki eystanfyri og vestanfyri Føroyar.

Fyrrapartin í gjár vóru onkrir lutir funnir og latnir politinum til eyðmerkingar, men tá blaðið fór til prentingar, var framvegis hvørki maður ella bátur funnin.

# Gongur lort hjá IRF

**Hjá IRF er so illa statt í løtuni, at teir í næstum fara at siga sjey fólkum úr starvi. Hetta fer at spara felagsskapinum eini tvær milliónir um árið, men tað er verri enn so ikki nóg mikið. Poul Andrias Joensen, stjóri á IRF, sigur, at nýggju umhvørviskrøvini krevja, at nógvar íløgur skulu gerast í framtíðini**

BRENNISTØÐ
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*



*Tað er so illa statt hjá IRF, at teir í næstum verða noyddir til at siga sjey fólkum úr starvi*

*Savnsmynd*

So illa gongur hjá IRF, at teir nú verða noyddir til at siga sjey fólkum úr starvi. Tað starvast 70 fólk hjá felagsskapinum, so talan er um heili 10 prosent av arbeiðsfólkunum.

– Vit hava gjørt innanhýsiskanningar og aðrar kanningar, og hugt og kannað eftir, hvar tað ber til hjá okkum at rationalisera og spara, men vit verða tíverri noydd til at siga fólkunum úr starvi, sigur Poul Andrias Joensen, stjóri á IRF.

Hann sigur, at tað hevur verið greitt í fleiri ár, at um IRF ikki fekk fleiri pengar, so koma teir at vanta í framtíðini. Og nú sær tað út til, at felagsskapurin hevur rent seg inn í ein múr.

Talan er um fýra fólk í ruskinnsavningini, eitt fólk á verkstaðnum og tvey í rotingarskipanini.

Uppsagnirnar koma at spara felagsskapinum um hálva aðru millión í ár, men uppá sikt væntar stjórin, at teir fara at spara tvær milliónir um árið.

## Alt roynt

– Allar aðrir møguleikar eru kannaðir, men hetta er nakað, vit eru noydd at gera, um brennistøðin skal drívast effektivt.

Ein av orsøkunum til mongu sparingarnar hjá IRF er, at nýggju krøvini um umhvørvisgóðkenning eru so mikið strong, at ein íløga uppá einar 15-30 milliónir krónur liggur bert tvey ár burturi. Byrjað verður longu í ár uppá tilrættisleggingarnar, og tað fer at kosta eini seks til sjey milliónir krónur. Her verður sipað til umbyggingar, soleiðis at IRF lýkur krøvini í umhvørvisgóðkenningini, og hetta arbeiðið byrjar helst í 2005, men tilrættisleggingarnar byrja longu í mars mánaði í ár.

– Vit hava sagt fyrr, at samfelagsgongdin er jøvn við rusknøgdirnar. Nú hava vit minkandi rusknøgdir, og tað er minni at gera.

Umframt at siga fólkum upp, so verða eisini tveir bilar settir innan heilt langa tíð. Haraftur er neyðugt at slaka uppá aðrar íløgur sum til dømis at keypa nýggjar bilar og bingjur.

Poul Andrias Mohr sigur, at sparingarnar uppsagnirnar føra við sær, eru verri enn so ikki nóg mikið. Tí skal sparast aðrastaðni eisini, slakast uppá íløgur, og hann væntar eisini, at tá stóra íløgan verður gjørd um tvey ár, so verða teir eisini noyddir at lána peng.

Samlaða skuldin hjá 15 ára gamla IRF er í dag 85 milliónir krónur.


## MÓTTØKA

Í sambandi við at Landingarmiðstøðin á Tvøroyri verður tikin í nýtslu, verður boðið til almenna móttøku mánadagin 11. januar frá 13.00 - 16.00.



P/F Landingarmiðstøðin á Tvøroyri


# Kanningararbeiðið byrjað

**Donsku serfrøðingarnir eru nú farnir í gongd við at kanna orsøkina til herviliga eldsbrunan í Sigmundargøtu mánanáttina**

ELDSBRUNI
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*



*Danskir serfrøðingar kanna nú orsøkina til herviliga eldsbrunan í Sigmundargøtu í Havn mánanáttina*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tveir menn frá kriminalteknisku deild hjá ríkispolitiovastanum og ein maður frá Dansk Brand- og Sikringsinstitut komu mikudagin upp til Føroya fyri at finna møguligu orsøkina til stóra eldsbrunan í Sigmundargøtu mánanáttina.

Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini, sigur, at arbeitt varð allan mikudagin og arbeiðið helt fram hósdagin. Enn ber tó ikki til at siga nakað neyvari um, nær eitt greitt úrslit er klárt, men hann væntar, at tað fer ikki at ganga so long tíð.

Sjálvt arbeiðið á staðnum skuldi eftir ætlan enda hósdagin og síðani skuldu menninir niðuraftur til Danmarkar fríggjadagin um onki serstakt kemur fyri.



# Skattatrýst valdast

TALFRØÐI
*Jákup Mørk*

Fíggjarmálastýrið finst at útrokningarháttinum í eini frágreiðing frá grannskoðanarfelagi, sum sigur føroyska skattatrýstið vera hitt hægsta í Europa

Fyri stuttum staðfesti grannskoðanarfelagið, Rasmussen & Weihe, at føroyska skattatrýstið er hitt hægsta í Europa, og tað vóru sjálvandi tíðindi, sum bæði kundu nýtast og misnýtast í valstríðnum, sum nú er um at koma í hæddina.

## Ymsir roknihættir

Í síni frágreiðing staðfestir Rasmussen og Weihe, at føroyska skattatrýstið er 40,1%, tá tosað verður um eina inntøku á 250 tkr. 48,1% fyri eina inntøku á 500 tkr., og 50% tá inntøkan er 750 tkr.

Orsøkin til, at Fíggjarmálastýrið nú finst at hesum tølum, er sum so ikki, at tey eru skeiv, men tí tey meta, at skattatrýstið ikki einvíst sýnir, í hvønn mun tað almenna krevur inn frá borgaranum. Ivaleyst eitt sjónarmið, sum mong ikki eru so heilt ósamd í, men sum hinvegin ikki hevur tað stóra at gera við arbeiðinum hjá eini grannskoðanarfyritøku, har útrokningar av skattskyldugari inntøku og skatturin av hesi eru týðandi partar av arbeiðsøkinum.

Fíggjarmálastýrið hevur í so máta helst onnur fyrilit at taka, og í teirra viðmerking verður ført fram, at tá skattatrýst í ymiskum londum verður sammett, verður aloftast roknað soleiðis, at samlaðu skattirnir og avgjøldini verða settir sum lutfall av bruttotjóðarúrtøkuni.

Í tíðindaskrivi staðfestir fíggjarmálastýrið, at hesin útrokningarhátturin gevur fylgjandi úrslit, um Føroyar verða samanbornar við nøkur av ES-londunum fyri inntøkuárið, 2000.

| Land | % av BTÚ |
|---|---|
| Svøríki | 54 |
| Danmark | 49 |
| Finland | 47 |
| **Føroyar** | **46** |
| ES tilsamans | 42 |
| Týskland | 38 |
| Stórabretland | 37 |


## KVINNUR MØTA KVINNUM



**Fríggjakvøldið 9. jan. kl. 21.30**

Kvinnupolitiskt Kvøld á Vertshúsinum við kvinnuligum valevnum úr øllum flokkum.
Beinta Løwe verður orðstýrari.

Latið mannin verða heima við uppvaskinum, sjónvarpinum og bajarunum og kom TÚ og tosa við tín komandi politikara og sig honum hvussu Føroyar skal stýrast.
Tað eru jú alt, alt ov fáar kvinnur á Løgtingi og sjálvandi velja kvinnur kvinnur tí "kvinnan eru eitt fólkaslag fyri seg sjálvan" (P Ålund).

Uni Debes fer at undirhalda við politiskum løgum,
og í barrini ber til at fáa sær ein politiskan rús.

Menn hava ikki atgongd fyrrenn á miðnátt



**Leygarkvøldið 10. jan. kl. 23.00**

Uni Debes trio spælir

VERTSHÚSIÐ

KVINNUR VELJA RESTORFFS

Sosialurin 341800







**GOTT NÝGGJÁR**

Frá 1. januar verður bíligari at ringja út í heim við fastnet telefon.

Danmark ........ -8%
Spania, Týskland og USA ........ -9%
Bretland, Finnland, Noreg, Norðurírland og Svøríki ........ -25%
Frakland og Holland ........ -50%

Príslækkingar á fartelefon netinum síggjast á www.tele.fo

+298 303030 www.tele.fo

FØROYA TELE

team85